**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

*Skrásetingar nr.:*
**L-C007-2**

# Leiðbeining um bandsagir til træsmíð

Bandsagir skulu vera væl útgjørdar og nýttar við skili, eftir reglum í arbeiðaraverndarlógini, og kunngerð um teknisk hjálpartól v.m., sum Arbeiðseftirlitið umsitur.

### *Brúkaravegleiðing*.

Fyri allar útveganir (sølu, leigu og lán) er galdandi, at skrivlig vegleiðing skal latast, sum er orðað á føroyskum ella donskum máli, við frágreiðing um nýtslu og viðlíkahald.

.

### *Útbúnaður.*

Bandsagir skulu tryggjast soleiðis,
- at fólk minst møguligt kunnu koma í samband við sagblað og saghjól.
- at sagblaðið ikki sleppur av hjólinum og er til vanda.
- at sagblaðið steðgar skjótast gjørligt, eftir at maskinan er sløkt.

Sagblaðið skal - undantikið økið sum sagblaðið arbeiðir í - verða vart.

Sagblaðið skal vera skjúlt undir borðinum. Yvir borðinum, frá blaðnum og upp eftir, skal verja vera frammanvert og á síðunum. Sí strikumynd 1.

Hjól við rimum el. líkn. á báðum síðum hava rundar plátir, sum inniloka hjólið, - uttan so at hjólið eisini er lokað á baksíðuni.

Stýrið um sagblaðið skal lættliga kunna stillast í ávísa hædd. Sagblaðsverjan í sambandi við stýrið, skal av sær sjálvum fylgja við stillingini.

Hvør einstøk bandsag skal hava nullspenningsfráfall, sum forðar fyri at hon óætlað fer í gongd tá streymslit ella ólag er á ljósnetinum. Koblingin skal vera nærindis startútbúnaðinum.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætning av tekniskum hjálpartólum frá 04.09.1995

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
| --- | --- |
| **21. mai 1988** | **30. januar 1998** |




**Strikumynd 1.**

1. Hæddarinnstilling av blaðstýri
2. Sagblaðverja frammanvert
3. Verja á síðunum og á toppinum
4. Verja yvir blaðstýri

*Start- og stop útbúnaðurin* skal vera lætt atkomiligur.

Start útbúnaðurin skal tryggja móti óætlaðum starti. Tað kann gerast við eitt nú:
- at startknøtturin er skjúldur, yvirlokaður ella útgjørdur við kraga,
- at snúningsavbrótarin er útgjørdur við kraga, uttan so at konstruktiónin forðar fyri ótilætlaðum ávirkanum.

Ein *bremsa* skal vera, um blaðið ikki steðgar í mesta lagi 10 sekundir eftir at sagin er avbrotin.

***Nýtsla*.**

Meðan bandsagin gongur, skal blaðstýrið stillast so nær arbeiðsevninum, sum gjørligt.
Tjúktin á sagblaðnum eigur ikki at vera størri enn 1/1000 av tvørmátinum á hjólinum.
Grundað á vanda fyri brot á hjólkrans á hjólum, gjørd úr stoypijarni við rimum, má hægst loyvda ferðin ikki vera størri enn 30 m/s.
Tá longri arbeiðsevni verða sagað, skal rullibukkur ella borðleingjari nýtast, sum forðar fyri at evnið koppar.



**Strikumynd 2.**
Tá stutt træ verða klovin, skal hjálpifjøl nýtast.



**Strikumynd 3.**
Tá rundstokkor verður kappaður, skal hjálpitræ nýtast.



**Strikumynd 4.**
Tá arbeiðsevni verður sagað eftir kanti, verður atløguvinkul og hjálpitræ nýtt.

***Viðlíkahald.***

Bandsag skal haldast væl og eigur altíð at vera í góðum standi. Fylg tí vegleiðing, sum sølumaðurin gevur.
Hjólverjan, ið blaðið hvílir á, skal vera rein og væl hildin.
Blaðið skal vera hvast og kastað á rættan hátt. Blað við rivu skal ikki nýtast.
Viðlíkahald og umvæling skal gerast tryggliga. Orkukeldan skal takast frá, t.d. við avbrótaralykli.
Stuðulskubbin í arbeiðsborðinum skal skiftast út, tá frástøðan millum sagblað og síðu er meira enn 1 mm.
Ùtskifting er lættast, um stuðulskubbin er í tveimum pørtum og kunnu skiftast hvør sær. Kubbin skal fylgja borðflatuni. Sí strikumynd 5.

Bert serkønir skulu umvæla sagblað.

***18 ára aldursmark.***



**Strikumynd 5.**
1. Slitin stuðulskubbi
2. Stuðulskubbi í tveimum pørtum

Ungfólk undir 18 ár eiga ikki at nýta bandsag. Serliga reglur eru galdandi fyri næmingar og lærlingar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** 21. mai 1988

Eli Davidsen, stjóri (sign.)